Kunngerðablaðið A
2011 Hefti 48
ISSN 0907-905X

Nr. 161 19. desember 2011

**Kunngerð**
**um**
**royndarskipan um gjøld fyri upplýsingar úr landsfólkayvirlitisskránni**

Við heimild í § 37, stk. 1 í løgtingslóg nr. 41 frá 8. mai 2007 um fólkayvirlit verður ásett:

**§ 1.** Umhvørvisstovuni verður heimilað at seta eina gjaldsskipan í verk fyri elektroniskar upplýsingar, ið verða latnar úr landsfólkayvirlitisskránni.
*Stk. 2.* Gjaldsskipanin er ein royndarskipan, ið einans er galdandi fyri føroysku peningastovnarnar, sum virka sambært ríkislóg um fíggjarligt virksemi.
*Stk. 3.* Gjøldini eftir hesi kunngerð, verða ásett fyri hvønn peningastovn sær og avroknað eina ferð um mánaðin.

**§ 2.** Upplýsingarnar, sum peningastovnarnir hava atgongd til, eru greinaðar í kapitli 10 í lógini.

**§ 3.** Fyri uppslag gjøgnum elektroniska web-atgongd í talgildu landsfólkayvirlitsskránni verða rindað hesi gjøld:
1) Stovnsetingargjald 20.000 kr.
2) Hald 20.000 kr. um árið.
3) Uppslag 10 kr. fyri hvørt.

**§ 4.** Fyri uppslag í talgildu landsfólkayvirlitsskránni gjøgnum elektroniska fakskipan verða rindað hesi gjøld:
1) Stovnsetingargjald 20.000 kr.
2) Hald 20.000 kr. um árið.
3) Fyri hvønn persón í kundadatabasa verður rindað 3 kr. um árið.
*Stk. 2.* Upplýsingar í fakskipanum verða dagførdar eina ferð um dagin.
*Stk. 3.* Hevur peningastovnurin áður rindað stovnsetingargjald sbrt. § 2, verður stovnsetingargjaldið sbrt. stk. 1 ikki rindað.

**§ 5.** Ásetingar um trygd, uppkrevjing av gjøldum o.a. verða avtalaðar í serligum sáttmála millum Umhvørvisstovuna og peningastovnarnar.

**§ 6.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Innlendismálaráðið, 19. desember 2011

**Kári P. Højgaard (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rúni Joensen (sign.)

Nr. 162 19. desember 2011

## Kunngerð um broyting í kunngerð um stuðul til flutning av fiski

### § 1

Í § 4, stk. 1 í kunngerð nr. 18 frá 20. februar 2009 um stuðul til flutning av fiski, verður „Lønjavningarstovuni“ broytt til: „Trygdargrunni fiskivinnunnar“.

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, 19. desember 2011

**Jákup Mikkelsen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

Nr. 163 19. desember 2011

## Kunngerð um broyting í kunngerð um veiðu eftir makreli við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2011

### § 1

Í kunngerð nr. 85 frá 8. juni 2011 um veiðu eftir makreli við fiskiførum undir føroyskum flaggi í 2011, sum seinast broytt við kunngerð nr. 103 frá 15. august 2011, verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 12, stk. 2 verður „12 %“ broytt til: „5 %“.

2) Í § 12, stk. 4 verður „15 %“ broytt til: „10 %“.

3) Í § 12, stk. 5 verður „12 %“ broytt til: „5 %“.

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, 19. desember 2011

**Jákup Mikkelsen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

Nr. 164 19. desember 2011

**Kunngerð**
**um**
**at seta úr gildi kunngerð um forboð móti fiskiveiðu á Flemish Cap**

**§ 1**

Kunngerð nr. 64 frá 18. oktober 1978 um forboð móti fiskiveiðu á Flemish Cap verður sett úr gildi.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, 19. desember 2011

**Jákup Mikkelsen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

Nr. 165 20. desember 2011

**Kunngerð um broyting í kunngerð um ALS- gjald**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 136 frá 3. november 2009 um ALS-gjald, verður í § 1 í staðin fyri „1,00 %“ sett: „1,25 %“.

**§ 2**

Hendan kunngerð fær gildi 1. januar 2012.

Vinnumálaráðið, 20. desember 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

Nr. 166 20. desember 2011

**Kunngerð um broyting í kunngerð um umsiting og virksemi hjá Vinnuframagrunninum**

**§ 1**

Í kunngerð nr. 142 frá 29. november 2001 um umsiting og virksemi hjá Vinnuframagrunninum, sum seinast broytt við kunngerð nr. 141 frá 19. november 2009, verður eftir § 8 sett:

„**§ 8 a.** Vinnuframagrunnurin kann eisini nýta heitið „Vinnuframi“.“

**§ 2**

Hendan kunngerð fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 20. desember 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

Nr. 167 20. desember 2011

**Kunngerð**
**um**
**frekvens- og avgreiðslugjøld á radiosamskiftisøkinum**

Við heimild í § 15e, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 79 frá 23. mai 1997 um fjarskifti, sum broytt við løgtingslóg nr. 15 frá 17. februar 2009 verður ásett:

**§ 1.** Fjarskiftiseftirlitið krevur inn hesi frekvens-gjøld:

Ársgjøld, siglingar- og –flogferðslutænastur:

| | | |
|---|---|---|
| X (MF-Telegrafútgerð) | kr. | 200 |
| Z (HF-Telegrafútgerð) | - | 200 |
| T (MF-Telefonútgerð) | - | 200 |
| U (HF-Telefonútgerð) | - | 200 |
| V (Føst VHF-útgerð) | - | 200 |
| B (Flytilig VHF-útgerð) | - | 100 |
| W (1-Watt-útgerð) | - | 100 |
| E (COSPAS-SARSAT EPIRB 406 MHz) | - | 150 |
| F (INMARSAT EPIRB 1645,5-1646,5 MHz) | - | 150 |
| S (INMARSAT fylgisveinaútgerð) | - | 350 |
| G (Radioteleksútgerð) | - | 350 |
| UHF (UHF innanborða samskifti í bátum/skipum) | - | 100 |
| Fastar VHF-siglinga og flogferðslutænastur á landi (LMR C-loyvi) | - | 1.000 |
| Fastar HF-siglingar støðir á landi (LMR C-loyvi) | - | 10.000 |
| Fastar MF-siglingastøðir á landi (LMR C-loyvi) | - | 10.000 |
| Flytiligar VHF-siglingar- og flogferðslutænastur á landi (LMR B-loyvi) | - | 200 |

*Ársgjøld, landstøðir:*

| | | |
|---|---|---|
| Høvuðsstøðir 30MHz, 2m, 4m og UHF (C-loyvi) | kr. | 300 |
| Flytiligar eindir (B-loyvi) | - | 100 |
| Radiofjarstýring (fyri hvønn frekvens/hvørja støð sær) (S-loyvi) | - | 200 |
| Telemetri (Fyri hvønn frekvens/hvørja støð sær, maks. 200 kHz bandbreidd)(S-loyvi)<br><br>Telemetri, breiðband (fyri hvørt MHz) (S-loyvi) | - | 200<br><br>1.000 |
| Mikrobylgju (Fyri hvønn frekvens/hvørja støð sær, maks. 200 kHz bandbreidd)(S-loyvi)<br><br>Mikrobylgju, breiðband (fyri hvørt MHz) (S-loyvi) | - | 200<br><br>1.000 |
| Samskifti við mátidata (Fyri hvønn frekvens/hvørja støð sær, maks. 200 kHz bandbreidd)(S-loyvi)<br><br>Samskifti við mátidata, breiðband (fyri hvørt MHz) (S-loyvi) | - | 200<br><br>1.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Mikrofonsendiútgerð (Fyri hvønn frekvens/hvørja støð sær) (S-loyvi) | - | 500 |
| Persónsleitiútgerð (Fyri hvønn frekvens/hvørja støð sær) (S-loyvi) | - | 200 |
| Royndarsendingar undir 3 GHz (S-loyvi) | - | 500 |
| Royndarsendingar yvir 3 GHz (S-loyvi) | - | 700 |
| Audio Link (S-loyvi) | - | 500 |
| Útvarp/Nærvarp. (Fyri hvønn frekvens/hvørja støð sær) (S-loyvi) | - | 3.000 |
| Sjónvarp (Fyri hvønn frekvens/hvørja støð sær) (S-loyvi) | - | 2.000 |
| Radioketur (Fyri hvønn staðarbundnan frekvens sær, íroknað 25 MHz) (S-loyvi)<br><br>Radioketur (Nýtsla omanfyri 25 MHz, gjald fyri hvørt MHz sær) (S-loyvi) | -<br><br>- | 2.000<br><br>80 |
| DVB-T (Hvønn frekvens sær/kanal sær) (S-loyvi) | - | 2.000 |
| SNG-fylgisveinasendiútgerð (Satellite News Gathering) (S-loyvi) | - | 3.000 |
| V-SAT fylgisveinaútgerð (Very Small Apparature Terminal) (Heavy Duty) (S-loyvi) | - | 3.000 |
| INMARSAT fylgisveinaútgerð | - | 3.000 |
| Fastar SAT-jørðstøðir (Føst fylgisveinaútgerð til breitt samskifti) (S-loyvi) | - | 10.000 |
| DCS (Digital Cellular System 1800 MHz. (Fyri hvørt MHz) (S-loyvi) | - | 3.000 |
| UMTS 2100 og 2600 (Fyri hvørt MHz) (S-loyvi) | | 3.000 |
| GSM (Global System for Mobile Communication) (Fyri hvørt MHz)(S-loyvi) | - | 3.000 |
| FWA (Fixed Wireless Access) (Fyri hvørji 10 MHz) (S-loyvi) | - | 3.000 |
| Nýfrættisútgerð (Reportageútgerð) (Fyri hvønn frekvens/hvørja støð sær)(S-loyvi) | - | 500 |
| MF-útvarpsstøðir (S-loyvi) | - | 10.000 |

Tilskilaðu stavirnar merkja:
C = Føst støð á landi.
B = Flytilig støð á landi
S = Øll onnur frekvens - loyvi á landi (Tíðaravmarkað loyvi, royndar-loyvi, telemetri, VSAT-loyvi o.s.fr.)

**§ 2.** Fjarskiftiseftirlitið krevur inn hesi avgreiðslugjøld:

*Siglingarradiopróvbrøv og próvtøkugjøld:*

| | | |
|---|---|---|
| GOC (General Operator´s Certificate) | kr. | 800 |
| GOC Endurnýggjanarroynd | - | 700 |
| ROC (Restricted Operator´s Certificate) | - | 700 |
| LRC (Long Range Certificate) | - | 700 |
| SRC (Short Range Certificate) | - | 500 |

*Annað:*

| | | |
|---|---|---|
| Áhugavarparar (Próvtøkugjald) | kr. | 500 |
| Makaprógv | - | 200 |
| Makaloyvi | - | 200 |
| Útflýggjan av loyvi | - | 150 |
| Tillutan av frekvensi | - | 500 |
| Altjóða samskipan av frekvensi | - | 3.500 |
| Skundavgreiðsla | - | 1.000 |

**§ 3.** Bjargingarfeløg og onnur áhugafeløg, sum virka innan tilbúgvingarøkið, eru undantikin øllum gjøldum, sum eftir hesari kunngerð standast av loyvi til nýtslu av frekvensi.

**§ 4.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2012. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 70 frá 2. november 2004 um frekvens (tíddar) - og avgreiðslugjøld á radiosamskiftisøkinum.

Vinnumálaráðið, 20. desember 2011

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705